


# Útlendsk oljuskip við kós móti Føroyum

**Jan Müller**

09.12.2013 - 13:51

Oljan.fo

Í gjár kom eitt útlendskt oljuveitingarskip á Havnina at skifta manning og proviantera. Hetta er næsta skipið hesar seinastu tvær vikurnar, og miðjan januar kemur enn eitt veitingarskip av leiðunum vestan fyri Hetland til Føroya. Ì veitingarvinnuni fegnast tey um, at útlendsku reiðaríini av álvara hava fingið eyguni upp fyri Føroyum. Nú restar bert í at fáa eina flogrutu millum Vágar og Aberdeen.

Nógv arbeiði

Nú stórar útbyggingar fara fram vestan fyri Hetland og tætt við føroyska markið royna eisini føroyskar fyritøkur og havnir at fáa sín part av køkuni. Í fleiri førum er teinurin frá oljuleiðunum stytri til føroyska enn hetlendska ella skotska havn. Tað hevur nógv at siga, men eisini prísurin og góðskan á føroysku vørunumog tænastunum hevur stóran týdning fyri, hvørjar veitarar oljufeløgini velja at brúka.

Gjøgnum mong ár hava føroyskir veitarar roynt at gera vart við Føroyar sum veitingardepil á eitt nú oljumessunum í Aberdeen. Seinast tóku føroysku veitararnir stig til at arbeiða saman og leggja seg eftir at selja pakkaloysnir fyri skip, sum koma til Føroya at skifta manning, taka provint, bunkra og gera ymsar umvælingar.

Oljan.fo hevur tosað við fólk í veitingarvinnuni, sum siga, at hetta er nakað, ið tekur tíð, men okkurt bendir á, at tað gongur rætta vegin. Tað ræður um at fáa fatur í rætta sambandinum.

Fleiri skip koma

Fyri fjúrtan døgum síðani var skotska veitingarskipið Vos Traveler á Havnini fyri at skifta manning og eftir provianti. Í gjár kom enn eitt skip frá reiðaríinum Vroon á Havnina í somu ørindum, og 16. januar kemur Vos Endurance í føroyska havn. Skipini arbeiða m.a. fyri Total, ið er við at byggja út gassleiðirnar Laggan og Tormore vestan fyri Hetland.

Hanus Jøkladal, sum hevur arbeitt við veitingarskipum, sum koma til Føroya í mong ár vegna Faroe Ship, sigur, at tað sýnist sum broytingar eru á veg, og at útlendsku reiðaríini hava fingið eyguni upp fyri Føroyum sum ein álítandi og kappingarførur veitari.

Mongu veitingarskipini, tað verið seg standby og supply, sum arbeiða í grannalagnum, skulu til lands at skifta mannin eina ferð um mánaðin. Bretsk lóg sigur eisini, at tey eina ferð um árið skulu í útlendska havn at skifta manning.

Hanus Jøkladal vísir á, at enn er ein stór forðing fyri at fáa veitingarskip henda vegin. Tað er væntandi flogsambandið til Aberdeen. Hann sigur seg vóna, at útmeldingarnar í seinastuni frá útlendskum flogfeløgum at fara undir at flúgva millum Aberdeen og Vágar, gerast veruleiki. Tí tað fer av álvara at gera Føroyar til ein veitingardepil fyri oljuvinnuna.

Myndir

Vos Valiant arbeiðir fyri Total á gassleiðunum Laggan og Tormore vestan fyri Hetland.

Myndatøka Jan Müller/oljan.fo









